# ONGANTÍÐ VERIÐ SO NÓGV HØRÐ RÚSEVNI



*Eitt tað mesta vanliga harða rúsevnið í Føroyum í dag eru sonevndu frímerkini. Talan er um lítið pappír við LSD í, sum verður lagt á tunguna, og sum sær ógvuliga "óskyldugt" út*

Narkodeildin hjá løgregluni í Føroyum er stúrin, tí teir hava ongantíð áður sær so nógv hørð rúsevni í landinum.

TERJI NIELSEN
TERJI@SOSIALURIN.FO

Herfyri var ein hending, har tað stóð um lív hjá einum ungum manni, sum hevði tikið rúsevnið LSD í eini gummibamsu. Tíbetur spældi hetta væl av, men hendingin kemur ikki óvart á narkodeildina hjá løgregluni, tí tað eru sera nógv hørð rúsevni í umferð í landinum í løtuni.

## Vaksið nógv seinasta árið

Á narkodeildini hava teir nógv at gera. Seinasta árið hava teir nevnliga lagt til merkis, at tað er væl meira til at av hørðum rúsevnum úti í samfelagnum.

— Vit hava ikki lagt hald á so nógv í ár, men í í hesum árinum er tað vaksið nógv við hørðum rúsevnum í Føroyum, og til dømis hoyra vit, at tað er nógv kokain í umferð, siga teir á narkodeildini hjá løgregluni.

Sum áðurnevnt var tað rúsevnið LSD, ið herfyri mundi kravt eitt mannalív, og júst LSD er eisini nógv útbreitt.

— Ein annar vandi við júst LSD er eisini, at tað ofta verður framleitt í einum slíkum hami, at tað sær ógvulig "óskyldugt" út. Til dømis í eini gummibamsu ella í einum frímerki. Tað er faktisk eitt sindur óhugnaligt, tí stutt undan áðurnevndu hending við gummibamsuni høvdu vit her á deildini tosað um, nær vit fóru at fáa eitt deyðsfall í Føroyum í sambandi við rúsevnir, siga teir á narkodeildini.

Á narkodeildini hava teir sjálvandi gjørt nógvar kanningar í sambandi við hendingina herfyri, tá ið ein gummibamsa við LSD mundi kravt mannalív, og hóast teir ikki kunnu siga nakað ítøkiligt í málið, so hava teir tó illgruna um, at talan er um, at LSD er sproytað í gummibamsuna Føroyum. Tað vil siga, at onkur hevur havt flótandi LSD og sproytað tað inn í gummibamsur.

## Nógv ymisk rúsevnir

Í Føroyum hava vit kanska lyndi til at halda, at tað er bert ein avmarkað nøgd og nøkur fá sløg av rúsevnum, ið kom til landið, men soleiðis er ikki í dag.

— Vit síggja øll rúsevni í Føroyum, sum vit síggja í londunum kring okkum. Tað er líka heroin, sum vit næstan einki síggja til, siga teir á narkodeildini.

Teir greiða frá, at summi evni eru meiri vanlig enn onnur, og tað eru serliga MDMA, LSD og Ritalin.

Men eitt annað rúsevni, ið eisini tykist vera nokk so vanligt, er GHB, ið eisini verður rópt flótandi fantasy. Tað er ikki fantasy, sum er eitt annað evni, men tað virkar á sama hátt sum vanligt fantasy. Hetta rúsevnið verður eisini brúkt til "drup rape" – tað vil siga, at hetta verður brúkt til at doyva ungar gentur, sum síðani kunnu blíva neyðtiknar. Hetta hava vit tó ikki havt nakað ítøkiligt mál við í Føroyum enn, siga teir á narkodeildini.

Tann stóri vandin við GHB er sambært narkodeildini, at tað er eitt øgiliga hárfínt mark millum eina dosis og eina yvirdosis.

— Í dag er GHB og LSD nógv meiri vanligt her í Føroyum, enn tað hevur verið, og nú hava vit eisini funnið Ketamin í sambandi við húsarannsókn. Gott nokk í smáum nøgdum, men tað hava vit so ikki funnið áður, siga teir.

Umframt vanliga og kendu rúsevnini, so finnast eisini onnur evni at rúsa seg við, og enntá finst okkurt í føroysku náttúruni.

— Tað eru soppar í náttúruni her í Føroyum, sum kunnu vera rúsandi. So seint sum farna vikuskifti var ein hending, har ein persónur endaði á Landssjúkrahúsinum, tí viðkomandi hevði brúkt slíkar soppar, ið kunnu vera sera vandamiklir, greiða teir á narkodeildini frá.

## Gerast yngri og yngri

Ein onnur gongd, sum eisini ørkymlar narkodeildina, er, at tað tykist sum um, at tey, sum brúka rúsevnir í Føroyum, gerast yngri og yngri.

— Tað sær út til, at brúkararnir gerast yngri og yngri, og teir eru um alt landið og úr øllum løgum í samfelagnum. Tey byrja við hash, men so flytir tað seg spakuliga yvir á onnur og sterkari rúsevnir, siga teir.

Teir dylja tó ikki fyri, at tey flestu koma úr heimum, sum kanska ikki eru líka væl fyri sum tey flestu.

— Vit síggja nógvar syndarligar lagnur, og vit vita eisini um heilt nógv ung, sum blíva blakað út heimanífrá, tí foreldrini klára ikki at stýra teimum, siga teir á narkodeildini.

Tí hevur narkodeildin eisini eina áheitan til foreldur um at hava eitt vakið eyga við teirra børnum.

— Foreldur eiga at hava eyguni eftir, um børn teirra kanska ganga við lími ella lightergassi uppi á sær, tí tað er ein heilt greið ábending um, at tey eru byrjað at sniffa, og tað ella hash er næstan altíð byrjanin. Man kann eisini hava eyguni eftir, um tey ungu blíva meiri sløv og líkaglað, og kanska sova longri enn vanligt, tí tað kann eisini vera ein ábending, siga teir.

Rúsevni kosta nógvar pengar, og tað er einki at ivast í, at onkur forvinnur nógvar pengar upp á sølu av rúsevnum.

— Onkur skorar kassan, og hesir persónar eru púra líkaglaðir við lagnurnar hjá brúkaranum. Men tað løgna er, at vit síggja næstan ongan fylgikriminalitet í sambandi við rúsevnanýtslu, sum man annars plagdi at síggja. Tað sær út til, at øll hava nokk av pengum, og tí hava ikki brúk fyri at gera kriminalitet fyri at fíggja misnýtsluna, siga teir á narkodeildini.

## Noyðast at raðfesta

Tað er einki at dylja yvir, at narkodeildin hevur sera nógv at gera, og umstøður eru ikki til at gera alt, sum teir kundu ynskt sær at gjørt.

Vit hava nøkur tung mál, sum krevja nógva orku frá okkum, og tí hava vit avmarkaða orku til onnur ting. Tí eru vit til dømis ikki longur úti á fólkaskúlunum og undirvísa, sum vit plagdu at gera. Vit noyðast at raðfesta, siga teir.

Men teir halda tó, at tað er umráðandi, at dentur verður lagdur á gera fyribyrgjandi átøk fyri at minka um nýtsluna av rúsevnum.

Tí tað eru nógv meiri hørð rúsevni í umferð í dag, enn tað hevur verið. Kanska kundi tað verið ein uppgáva fyri Fólkaheilsuráðið at gjørt eitt átak móti rúsevnum. Tað høvdu vit so ynskt, siga teir á narkodeildini.





# Vaksandi eftirspurningur eftir viðgerð



*Tey trý, ið standa fyri viðgerðartilboðnum DAT Ung, Birna í Hjøllum Hentze, Thorvald Danielsen og Jutta Olsen Mynd: Álvur Haraldsen*

Blákrossheimið, sum hevur eitt serligt tilboð til ung millum 15 og 18 ár við rúsnýtsluórógvi, merkja ein vaksandi eftirspurning eftir hjálp

TERJI NIELSEN
TERJI@SOSIALURIN.FO

Tað eru um trý ár síðani, at Blákrossheimið fór undir eitt serligt tilboð til ung við rúsnýtsluórógvi, sum nevnist DAT ung. DAT er ein viðgerðarháttur, sum eisini verður nýttur á Blákrossheiminum..

Tað eru tey trý, Thorvald Danielsen, sálarfrøðingur, Birna í Hjøllum Hentze, sálarviðgeri og Jütta Olsen, leiðari á Blákrossheiminum, sum taka sær av DAT Ung.

— Vit byrjaðu fyri einum trimum árum síðani, tá ið vit sóu ein tørv. Tað var einki tilboð tá til hendan aldurbólkum, og søgurnar hjá teimum, sum koma í viðgerð á Blákrossheiminum, søgdu okkum, at fleiri byrja at fáast við rúsevni, tá ið tey eru rættiliga ung, siga tey trý frá DAT Ung.

## Mest hash

Tey greiða frá, at hjá teimum, sum eru í viðgerð undir DAT Ung, er tað fyrst og fremst hash, sum er trupulleikin.

— Tey ungu hjá okkum eru í allarflestu førum bundin av hash, men brúka eisini hørð rúsevni av og á. Vit hoyra um tey hørðu rúsevnini so sum MDMA, LSD frímerkini og Ritalin, sum tykjast verða nógv útbreidd, men tey, sum koma her til okkum, eru ikki beinleiðis bundin av hesum enn, siga tey.

Tey greiða frá, at tá ið talan er um tey millum 15 og 18 ár, sum ganga hjá DAT Ung, so er talan um eina ambulanta viðgerð.

Hetta fer fram á tann hátt, at vit hava viðtalu við tann einstaka unga persónin og hansara avvarandi, og so hava vit eisini bólkaviðgerð, har tey fáa undirvísing. DAT er ein viðgerð, har tey ungu fáa nøkur amboð at arbeiða við, sum skal gera tað lættari hjá teimum at klára lívsins avbjóðingar, siga tey hjá DAT Ung.

Sambært teimum trimum so er talan um ung, sum koma úr øllum Føroyum og úr øllum sosialum bólkum.

Sambært teimum er talan í flestu førum um, at tað eru avvarandi so sum foreldur ella eitt nú barnavernd, ið venda sær til teirra at biðja um hjálp, tí tann ungi persónurin sær ikki altíð trupulleikan sjávur.

## Bíðilisti til viðgerð

Hjá DAT Ung er pláss fyri 16 ungum at vera í viðgerð í senn, og eftirspurningurin er stórur.

— Tað er fullteknað, og tað er eisini bíðilisti til at sleppa í viðgerð. Vit síggja eisini, at tølini eru vaksin seinnu árini, og tað er einki at ivast í, at talið í ár verður enn hægri enn undanfarna ári, siga tey trý.

Av teimum, sum venda sær til DAT ung í sambandi við rúnýtsluórógv, eru tað langt frá øll, sum koma í viðgerð.

Tá man er ungur er tað nógv sum er spennandi og tey hava nógv um at vera, tí er motivatión ein týdandi partur av viðgerðini. At gera eina broyting í lívinum, má geva meining fyri tann unga og júst tað brúka vit tíð at tosa við tey um, siga tey hjá DAT Ung.